Leygardagur 24. august

SVF

16.10 Rákið 3:3
17.00 Oggy og kakkulákkarnir
17.05 Teldukæti
17.15 Hitt kynið - am. ungdómsrað
18.00 Vinir - am. rað
18.20 Stuttligar lýsingar
18.30 Heidi og fjallaabbin 20:26
18.55 Neri, havsins genta 25:26
19.20 Lassie
19.45 Basalt
20.35 Richie Rich - heimsins ríkasti drongur - am. filmur
22.05 One Night With You - Elvis Presley
22.55 Dómadagstiltak 2:2 - amerikonsk stuttrað - Ohóskandi fyri smábørn
0.25 Liðugt

EUROSPORT

07:30 Equestrianism: Samsung Nations Cup Dublin Ireland
08:30 Rally: World Championship Germany Brno
09:00 Canoeing (Live): World Championship France Bourg Saint Maurice
11:45 Motorcycling (Live): Grand Prix Czech Republic Brno
12:15 Motorcycling (Live): Grand Prix Czech Republic Brno
13:00 Motorcycling (Live): Grand Prix Czech Republic Brno
14:15 Motorcycling (Live): Grand Prix Czech Republic Brno
15:15 Canoeing (Live): World Championship France Bourg Saint Maurice
16:45 News: Eurosportnews Flash
17:00 Football: European Championship Euro 2004
18:00 Tennis (Live): Wta Tournament New Haven United States
19:30 Tennis (Live/Delayed): Atp Tournament Long Island United States
21:00 Equestrianism: Samsung Nations Cup Donaueschingen Germany
22:00 News: Eurosportnews Report
22:15 Tennis: Grand Slam Tournament U.S. Open New York United States
23:15 Rally: World Championship Germany Brno
23:45 Motorcycling: Grand Prix Czech Republic Brno
00:45 News: Eurosportnews Report

BBC PRIME

0.00 TLZ: »Great Romances of the 20th Century – Juan & Evita Peron«
0.30 TLZ: »Great Romances of the 20th Century – Winston & Clementine Churchill«
1.00 TLZ: »Conspiracies – Big Brother«
1.30 TLZ: »Castles of Horror – Torture«
2.00 TLZ: »Pink Parents«
3.00 TLZ: »Quinze Minutes«
3.15 TLZ: »Quinze Minutes«
3.30 TLZ: »Make German Your Business«
4.00 TLZ: »Make or Break – Hell For Leather«
4.30 TLZ: »Back to the Floor – Ambulance«
5.00 TLZ: »The Experimenter«
5.20 TLZ: »Numbertime – Number 9«
5.40 TLZ: »Landmarks – Tudors and Stewarts – Henry VII«
6.00 Just So Stories: »How the Whale got his Throat«
6.10 Playdays: »Whybird Stop«
6.30 Superted
6.40 Superted
6.50 Smart
7.10 Just So Stories: »The Elephant's Child«
7.20 Playdays: »Dot Stop«
7.40 Superted
7.50 Superted
8.00 The Borrowers
9.00 The Weakest Link
9.45 Battersea Dogs Home
10.15 Wildlife: »Bands on the Run«
10.45 Holiday Snaps: »Glasgow/Provence/Cotswolds«
11.00 Garden Invaders
11.30 Antiques Roadshow: »Stroud«
12.00 House Invaders: »Yardley«
12.30 The Good Life: »The Last Posh Frock«
13.00 What not to Wear
13.30 What not to Wear
14.00 What not to Wear
14.30 What not to Wear
15.00 Dr. Who: »The Five Doctors«
15.25 Dr. Who: »The Five Doctors«
16.00 Top of the Pops
16.30 Top of the Pops Prime
17.00 Liquid News
17.30 Charlie's Garden Army: »Manchester«
18.00 House Detectives: »Brighton«
18.30 Predators: »Special Agents«
19.00 Wild and Dangerous: »Lion Country«
19.30 Jeremy Clarkson's Extreme Machines
20.00 Maternity: »Singles«
20.50 What the Romans did for us: »Arteries of the Empire«
21.30 Top of the Pops
22.00 Top of the Pops 2
22.45 A Little Later: »Robbie Williams«
23.00 Parkinson: »Samuel L. Jackson, Robbie Coltrane«

BBC WORLD

00:00 BBC News
00:30 HARDtalk (r)
01:00 BBC News
01:30 Click Online (r)
02:00 BBC News
02:30 Correspondent (r)
03:00 BBC News
03:30 Asia Today (r)
03:45 World Business Report (r)
04:00 BBC News
04:30 Fast Track (r)
04:45 Holiday (r)
05:00 BBC News
05:30 Talking Movies (r)
06:00 BBC News
06:30 The Money Programme (r)
07:00 BBC News
07:30 Click Online (r)
08:00 BBC News
08:30 Correspondent (r)
09:00 BBC News
09:10 Natures Numbers
10:00 BBC News
10:10 Great Railway Journeys: Return Ticket
11:00 BBC News
11:30 Mary Anne's Bikes (r)
12:00 BBC News
12:30 This Week
13:00 BBC News
13:10 Natures Numbers (r)
14:00 BBC News
14:30 Correspondent (r)
15:00 BBC News
15:10 State Of The Planet
16:00 BBC News
16:10 Great Railway Journeys: Return Ticket (r)
17:00 BBC News
17:30 Talking Movies (r)
18:00 BBC News
18:30 This Week (r)
19:00 BBC News
19:30 Earth Report (r)
20:00 BBC News
20:10 Natures Numbers (r)
21:00 BBC News
21:30 Talking Movies (r)
22:00 BBC News
22:10 State Of The Planet (r)
23:00 BBC News
23:30 The Money Programme (r)

3

05:25 Garfield Og Venner
05:50 Garfield Og Venner
06:15 Børnehjørnet
09:25 Alt Under Kontrol
10:25 Havets Hemmeligheder
11:30 Harem 2001
12:30 Modeljagten - De Første Glimt
13:00 Christy: Return To Cutter Gap
14:45 Timepiece
16:30 As If
17:00 Frederik Fetterlein Og Maxov- - Gift Til Gods Og Guld
18:00 Tve-Kampen
19:00 The Waterboy
20:40 Sex & The City
21:15 Sex & The City
21:50 Kina-Syndromet
00:10 Vore Værste År
00:40 Vore Værste År
01:10 Forrådt Af Kærligheden
02:50 V.I.P.
03:40 Godnat

ÚF

07.00 Tiðindi
07.03 Morgunlestur - Harriet Lamhauge í Lamba lesur
07.15 Morguntónleikur
07.30 Tiðindi
07.35 Morguntónleikur
08.00 Tiðindi
08.03 Leygarmorgun í studio 5 - Kim Hansen velur tónleikin
09.00 Tiðindi
09.03 Barnaútvarpið (e) - Jonna og Katrin stíla fyri
09.35 Dagsins tónar
09.50 Morgunlestur (e) - Harriet Lamhauge í Lamba lesur
10.00 Tiðindi
10.03 Fimleikaløtan 3
10.10 Tit skriva, vit spæla
11.00 Rót og rútma - Petur Rouch velur country tónleik
12.00 Veðurtiðindi
12.15 Skráin og lýsingar
12.20 Tiðindi
12.40 Degurðatónar
13.00 Vikan ið fer - Dánjal Højgaard tekur saman um tiðindini í vikuni
14.00 Vikuskiftið (e) - Suni Merkistein leggur til rættis
15.00 Menuettin - Jóannes S. Hansen skipar fyri.
16.00 Kyrrindi (e) - Tónleikasending hjá Fimmboða Lisberg
17.00 Suggan - Gissur Patursson velur lagini
18.30 Tiðindini
18.40 Ítróttatiðindi
19.00 V4-dráttur
19.05 Summarband - Robert McBirnie leggur til rættis.
20.00 15 tær bestu - Niels Uni Dam stílar fyri
21.00 Harmonikutónar - Flóvin Jacobsen velur tónleikin
21.50 Hetta heilaga evangeliið skrivar - Jónsvein Bech, prestur, leggur til rættis
22.00 Tiðindi

Rás

09:45 Orðið - Bibliulestur v/ Anju Hansen.
10:00 HB — Rásin (e) - Endursending frá fríggjadegnum. Sending um og við fólki frá ítróttarfelagnum HB.
11:00 Tónleikur
13:00 Á Torginum (EvR) (e) - Endursending frá týskvøldinum. Samrøða við Maritu Nystrøm, úr Klaksvík, búsitandi í Hirtshals. Rúna Sivertsen leggur til rættis.
14:30 Tónleikur
17:00 Fólk á rásini - Vagnur Michelsen leggur til rættis
18:00 Tónleikur
20:00 Beatin - Tónleikasending fyri ung. Eyðfinn Drewsen leggur til rættis.
21:15 Orðið (e) - Endursending frá í morgun. Bibliulestur v/ Anju Hansen.
21:30 Tónleikur
00:00 Liðugt

Radio 1

9.00 Byrjan - Dagsskráin verður lisin
9.05 Bankabók Trúarinnar - eftir C. H. Spurgeon
9.30 Tónleikur fyr børn
10.00 Norðurlenskur tónleikur
13.00 Dagsskrá verður lisin
13.05 Bankabók Trúarinnar - eftir C. H. Spurgeon
14.00 Brot og bitar, samandráttur frá tíðindasendingunum frá farnu viku
14.30 Tónleikur fyr børn
15.00 Horizon Star v/ Stellu Zachariassen (e)
16.00 Tónar og Innihald v/ Høgna H. Hansen og Jan Zachariassen (e)
17.00 Sjómannsendingin Vitin v/ Símun Hansen
18.00 Dagsins orð eftir Svenning av Lofti
18.05 Tónleikasending v/ Jens Lisberg
20.00 Tónleikur fyr børn
21.00 »Avdúking« talur eftir David Wilkersson — Jógvan Skýlindak leggur til rættis
22.55 Dagsins orð eftir Svenning av Lofti
23.00 Dagsskrá fyri sunnudag verður lisin
23.10 Vón fyri teg, v/ Sólbjørg, Solveig o.a
2.00 Tónar & Innihald (e)
3.00 Blandaður tónleikur
6.00 Vit gevast

Sunnudagur 25. august

SVF

16.00 Maðurin við bjarnunum - am. náttúrusending
16.55 Tað gamla gullið - danskur filmur
18.30 Lítla bjørn 18:26
18.55 Lassie
19.20 Eitt prát við Liv Ullmann - finsk sending
19.50 Andakt við Johild Finnsonn
20.00 Tann langa ferðin - um sluppina Coronet
21.20 Frú Marianna 1:4 - svensk kærleiksrað
22.50 Søgan um Walt Disney 3:3
23.15 Liðugt

EUROSPORT

07:30 Xtreme Sports: Yoz Mag
08:00 Rally: World Championship Germany Brno
08:30 Beach Volley: World Tour China Maoming
09:00 Motorcycling (Live): Grand Prix Czech Republic Brno
09:30 Motorcycling (Live): Grand Prix Czech Republic Brno
10:00 Motorcycling (Live): Grand Prix Czech Republic Brno
11:15 Motorcycling (Live): Grand Prix Czech Republic Brno
12:30 Motorcycling (Live): Grand Prix Czech Republic Brno
14:15 Canoeing (Live): World Championship France Bourg Saint Maurice
16:15 Athletics: Iaaf Grand Prix I Meeting London United Kingdom
17:45 News: Eurosportnews Flash
18:00 Cart: Fedex Championship Series Elkhart Lake United States
19:00 Tennis (Live): Atp Tournament Long Island United States
20:30 Nascar: Winston Cup Series Michigan Brooklyn United States
21:30 Car Racing: American Le Mans Series Bowmanville United States
22:30 News: Eurosportnews Report
22:45 All Sports: Watts
23:15 Rally: World Championship Germany Brno
23:45 Tennis: Grand Slam Tournament U.S. Open New York United States
00:15 News: Eurosportnews Report

BBC PRIME

0.00 TLZ: »Fascinating Rhythm – The Story of Tap«
1.00 TLZ: »Secrets of World War II – Nazi Plundering of Europe«
2.00 TLZ: »Tobacco Wars – Lighting Up«
3.00 TLZ: »Jeunes Francophones – Les Media«
3.30 TLZ: »Buongiorno Italia! – Rivediamo Un Po'«
4.00 TLZ: »Bubble Trouble – Opening Up«
5.00 TLZ: »Watch – Art Start«
5.20 TLZ: »Landmarks – Geography Postcards – City and Countryside«
5.40 TLZ: »Megamaths – Problem Solving – Measures Length«
6.00 Just So Stories: »How the Rhinoceros got his Skin«
6.10 Playdays: »Playground Stop«
6.30 Superted
6.40 Superted
6.50 Smart
7.10 Just So Stories: »The Beginning of Armadillos«
7.20 Playdays: »Roundabout Stop«
7.40 Superted
7.50 Superted
8.00 Blue Peter
8.25 Blue Peter
8.45 Top of the Pops Prime
9.15 Totp Eurochart
9.45 Battersea Dogs Home
10.15 Zoo Keepers
10.45 Holiday Snaps: »Cotswolds/Isle of Wight/Scotland«
11.00 Garden Invaders
11.30 Antiques Roadshow: »Carlisle«
12.00 House Invaders: »Seaford«
12.30 To the Manor Born
13.10 Eastenders Omnibus
13.35 Eastenders Omnibus
14.05 Eastenders Omnibus
14.35 Eastenders Omnibus
15.00 S Club 7 In Miami: »How Deep Is Your Love«
15.25 S Club 7 In Miami: »Reprise«
16.00 Top of the Pops 2
16.45 The Weakest Link
17.30 Gardeners' World
18.00 Bargain Hunt: »Newark«
18.30 One Foot in the Grave: »The Wisdom of the Witch«
19.30 Last of the Summer Wine: »Beware of the Hot Dog«
20.00 Very Important Pennis
20.30 Best of British: »Ben Elton«
21.10 Smell of Reeves & Mortimer
21.40 Ruby's American Pie: »Porno«
22.15 Bottom: »Dough«
22.45 The Cops
23.35 Dr. Who: »The Five Doctors«

BBC WORLD

00:00 BBC News
00:30 This Week (r)
01:00 BBC News
01:30 Fast Track (r)
01:45 Holiday (r)
02:00 BBC News
02:30 The Money Programme (r)
03:00 BBC News
03:30 Correspondent (r)
04:00 BBC News
04:30 This Week (r)
05:00 BBC News
05:30 Mary Anne's Bikes (r)
06:00 BBC News
06:30 Reporters
07:00 BBC News
07:30 Seven Days That Shook The Planet (r)
08:00 BBC News
08:30 Earth Report (r)
09:00 BBC News
09:30 This Week (r)
10:00 BBC News
10:10 State Of The Planet (r)
11:00 BBC News
11:30 Click Online (r)
12:00 BBC News
12:30 The Money Programme (r)
13:00 BBC News
13:10 Great Railway Journeys: Return Ticket (r)
14:00 BBC News
14:30 Reporters (r)
15:00 BBC News
15:05 Dateline London
16:00 BBC News
16:10 Natures Numbers (r)
17:00 BBC News
17:30 Fast Track (r)
17:45 Holiday (r)
18:00 BBC News
18:10 State Of The Planet (r)
19:00 BBC News
19:30 The Money Programme (r)
20:00 BBC News
20:10 Great Railway Journeys: Return Ticket (r)
21:00 BBC News
21:30 Mary Anne's Bikes (r)
22:00 BBC News
22:30 Dateline London (r)
23:00 BBC News
23:30 Reporters
23:45 Asia Today

3

05:00 Garfield Og Venner
05:25 Garfield Og Venner
05:50 Børnehjørnet
09:00 Alt Under Kontrol
10:00 Prince Charming
11:40 Robinson: Opgøret Er I Gang
13:45 Indiana Jones På Nye Eventyr
15:30 Any Day Now
16:30 Felicity
17:30 Heksene Fra Warren Manor
18:30 Onside
20:00 Daylight
22:10 Demon Knight
23:50 Vore Værste År
00:20 Vore Værste År
00:50 Nina Takes A Lover
02:40 V.I.P.
03:35 Godnat

ÚF

10.00 Tiðindi
10.05 Sunnudagsløtan - Jonna og Katrin leggja til rættis
10.30 Sálmar og sangir (e) - Nøkur av sálma- og sangløgunum hjá Carl Nielsen. Janus Mohr leggur til rættis
11.00 Guðstænasta í Eiðis kirkju - Emil Olsen, prestur, prædikar.
12.10 Grammofonkonsert
12.45 Degurðatónar
13.10 Drongurin, sum ikki vildi sovna um kvøldið - Hanna Lisberg stuttsøgu, sum hoin sjálv hevur týtt eftir íslendingin Ármann K. Einarsson.
13.40 Í liðum við glitrandi sund - Føroyskir sangir. Janus Mohr leggur til rættis
14.00 Tiðindini
14.15 Kvøðuljómar
15.15 Frásøgn frá fótbólti - Jógvan Arge og Suni Merkistein siga frá.
17.00 Villar viddir (e) - Studio Pegasus
18.00 Tónatutl - Bitar úr søguni hjá felagnum Tutl. Hans Egholm stílar fyri
18.30 Tiðindi
18.40 Ítróttatiðindi
19.00 Klassiskt sunnukvøld
21.00 Veðurtiðindi

Rás

09:45 Orðið - Bibliulestur v/ Anju Hansen.
10:00 Tónleikur
13:00 Kelduvaðið (EvR) - Páll, Brynleif og María Poulsen siga frá um kristiboðan. Høgni Johannesen, trúboðari, talar yvir meginlærur Bibliunnar. Hesaferð: Hvør er hin Heilagi Andin
13:45 Tónleikur
16:00 Barnarásin (EvR) - Hesaferð við luttøku úr Havn. Elin Madsen leggur til rættis.
16:30 Tónleikur
20:00 Kelduvaðið (EvR) (e) - Endursending frá kl. 13.00 í dag. Páll, Brynleif og María Poulsen siga frá um kristiboðan. Høgni Johannesen, trúboðari, talar yvir meginlærur Bibliunnar. Hesaferð: Hvør er hin Heilagi Andin
21:00 Tónleikur
21:15 Orðið (e) - Endursending frá í morgun. Bibliulestur v/ Anju Hansen.
21:25 Tónleikur
23:00 Liðugt

Radio 1

9.00 Byrjan - Dagsskráin verður lisin
9.05 Bankabók Trúarinnar - eftir C. H. Spurgeon
9.30 Barnalindin, beinleiðis sending úr studio A, vertur er Liv Jacobsen
10.00 Lovsangur
12.00 Møti
13.00 Dagsskrá verður lisin
13.05 Bankabók Trúarinnar - eftir C. H. Spurgeon
13.30 Lovsangur
14.30 Barnalindin Barnasending v/ Lív Jacobsen (e)
15.00 Sjómannsendingin Vitin v/ Símun Hansen (e)
16.00 Teldan velur løg
17.55 Dagsins orð eftir Svenning av Lofti
18.00 Tónleikur fyri tillkomin
20.00 Barnalindin Barnasending v/ Lív Jacobsen (e)
20.55 Bankabók Trúarinnar - eftir C. H. Spurgeon
21.00 Møti (e)
22.55 Dagsins orð eftir Svenning av Lofti
23.00 Dagsskráin fyri mánadag verður lisin
23.10 Blandaður tónleikur, Dagsins Orð, o.a.
6.00 Vit gevast

UTTAN ÚR HEIMI

Vatn hóttir 10 mió. fólk

Longu nú er so nógv vatn í gøtunum í býnum Changsha, at bjargingarliðini noyðast at nýta bát fyri at flyta fólk úr húsunum

Myndugleikarnir í Kina fóru í gjár undir at flyta fólk burtur frá Dongting-vatninum, sum hóttir við at fara upp um bakkan.

VATNFLÓÐ
Árni Joensen:

Í kinesiska landspartinum Hunan royna 850.000 arbeiðsmenn og hermenn at forða fyri, at tað stóra Dongting-vatnið skal fara upp um bakkan. Seinast tað hendi var í 1998, og tá druknaðu meiri enn 4.000 fólk.

Í gjár var vatnstøðan í Dongting-vatninum 34,45 metrar, sum er næstan hálvan triðja metur oman fyri tað, sum er vandamarkið. Hetta fekk myndugleikarnar at lýsa alt økið kring vatnið sum vandaøki, samstundis sum undantaksstøða varð sett í gildi.

Dongting-vatnið er tað størsta vatnið í Kina og er til støddar sum Luxenbourg. Seinastu trý árini hevur vatnið ongantíð verið so stórt, sum tað er nú, men enn er tað kortini ikki so stórt sum í 1998.

Kinesisku myndugleikarnir siga, at fer vatnið upp um bakkan, fer tað eisini at elva til vatnflóð í Yangtseánni, og so er vandi fyri, at høvuðsstaðurin í Hubei-landspartinum, Wuhan, verður lagdur undir. Í býnum búgva umleið sjey milliónir fólk. Eisini er stórur vandi fyri, at vatnflóðin fer at raka høvuðsstaðin í Hunan-landspartinum. Tað er býurin Changsha, har seks milliónir fólk búgva.

So floymir heroin aftur úr Afghanistan

Bøndurnir í Afghanistan eru aftur farnir at dyrka opium, nú Taliban-stýrið er burturi

AFGHANISTAN
Árni Joensen:

Alment hevur tann nýggja stjórnin í Kabul roynt at forða bøndrunum í at dyrka opium, men sambært eftirlitinum hjá ST hevur hetta bert verið ein viðfáningur.

ST sigur, at í útsynningspatinum av Afghanistan verða umleið 9.000 hektarar av góðari landbúnaðarjørð nýttir til opium, samstundis sum hveitiakrarnir eru minkaðir burtur í næstan einki. Hetta er beint ímóti tí, sum stjórnin hjá Hamid Karzai, forseta kunngjørdi í apríl, tá hon segði, at nú skuldu bøndurnir dyrka hveiti til afghanska fólkið. Stjórnin hevur boðið bøndrunum pengar fyri at fáa teir at oyðileggja opiumsplanturnar. Tilboðið hjá stjórnini er, at ein bóndi kann fáa 1250 amerikanskar dollarar fyri hvønn hektar við opiumsplantum, men tað er einki at siga til, at bøndurnir heldur velja opiumið, sum kann geva einar 16.000 dollarar fyri hvønn hektar, eydnast heystið væl.

Tað mótsigandi í hesum er, at tá Taliban-stýrið ráddi fyri borgum í Kabul, høvdu myndugleikarnir nógv betri eftirlit við opiumsdyrkingini. Fyri tveimum árum síðani setti Taliban-stýrið bøndrunum forboð fyri at dyrka opium. Kortini lat stýrið nakrar bøndur halda fram, men kravdi skatt afturfyri.

Grannalondini hjá Afghanistan og fleiri lond í Evropa hava kravt, at stjórnin hjá Hamid Karzai gera okkurt munagott fyri at steðga opiumsdyrkingini. Afghanistan er heimsins størsta opiumskelda, og eitt tíðarskeið kom meiri enn 80 prosent av øllum heimsins opiumi haðani. Sambært ST var framleiðslan 4.500 tons í 1999 og 3.200 tons í 2000, og alt bendir á, at framleiðslan nú fer at veksa aftur.

Fáa ikki forða tí

Umleið 70 prosent av rúsevninum úr Afghanistan verður smuglað ígjøgnum Iran, Pakistan og fyrrverandi sovjetsku lýðveldini til Evropa. Myndugleikarnir í Iran siga, at har eru umleið tvær milliónir rúsevnismisnýtarar, og landið hevur skipað fyri umfatandi tiltøkum fyri at steðga smuglingini úr Afghanistan. Rúsevnisflutningurin var eisini eitt av høvuðsmálunum, tá iranski forsetin, Mohammed Khatami, var í Kabul herfyri og tosaði við Hamid Karzai.

Karzai hevur lovað, at stjórnin fer at gera tað, sum gerast kann, men sambært ST kunnu hvørki teir afghansku myndugleikarnir, útlendsku herdeildirnar í landinum ella marknavaktirnar í Turkmenistan, Usbekistan, Pakistan ella Iran forða tí veksandi floyminum av heroini úr Afghanistan.

Ikki bara Pan Fish

Pan Fish er ikki tann einasta norska fiskivinnufyritøkan, sum hevur figgjarligar trupulleikar at dragast við.

Í gjár kunngjørdi ein onnur stór fyritøka, Fjord Seafood, at hon hevði 115 milliónir krónur í halli í apríl ársfjórðingi. Sama ársfjórðing í fjør var hallið 86 milliónir krónur.

Leiðslan í Fjord Seafood sigur, at hon fer at siga 10 prosentum av starvsfólkinum upp, og saman við øðrum tiltøkum er ætlanin at spara millum 60 og 70 milliónir krónur í rakstrinum.

USA trýstir nú Kolombia

Amerikanska stjórnin leggur nú trýst á stjórnina í Kolombia fyri at fáa hana at skriva undir ein sáttmála, sum skal tryggja, at kolombisku myndugleikarnir ikki útflýggja amerikanskar ríkisborgarar til rættarsókn í altjóða krígsbrotsmannadómstólinum.

Amerikanski varauttanríkisráðharrin, Marc Grosman, hevur júst verið í Kolombia, og heimafturkomin segði hann, at kolombiska stjórnin er sinnað at umhugsa amerikansku áheitanina.

USA sýtir fyri at samstarva við nýggja altjóða krígsbrotsmannadómstólin og roynir at fáa onnur lond at binda seg til ikki at lata dómstólinum amerikanskar ríkisborgarar. Amerikansk lóg heimilar stjórnini at revsa lond, sum ikki vilja ganga áheitanini á møti.

Roykur steingir skúlar

Í einum indonesiskum landsparti er luftin nú so dálkað, at myndugleikarnir hava kent seg noyddar at lata skúlarnar aftur, samstundis sum fólk hava fingið boð um at hava gassmasku, fara tey útum.

Ein talsmaður fyri myndugleikarnar í Vestur Kalimanten sigur, at luftin er so illa dálkað, at sýnið er ikki meiri enn góðar 500 metrar.

Kanningar hava víst, at dálkingin eftir øllum at døma stavar frá skógareldi. Men í Indonesia er tað ikki náttúran, sum festir í skógirnar, men heldur fólk, sum rudda stór skógarøki fyri at útvega sær landbúnaðarjørð.

Flogskiparar fáa ein lúr

Evropeisku loftferðslumyndugleikarnir skjóta nú upp, at flogskiparar skulu fáa møguleikan at fáa sær ein lúr, meðan teir sita í stýrihúsinum á fullsettum flogfari langt uppi í luftini. Sambært uppskotinum kann annar flogskiparin leggja seg afturá í 15-30 minuttir, og tá hann er komin fyri seg aftur, kann hin leggja seg.

Norðurlendsku loftferðslumyndugleikarnir skulu eisini taka støðu til uppskotið, og bæði norsku og svensku myndugleikarnir hava longu boðað frá, at teir halda uppskotið vera í lagi, um tað kann bøta um trygdina í loftferðsluni.

Hinvegin er ikki líkt til, at norðurlendsku flogskipararnir eru serliga fegnir um hugskotið. Ein talsmaður hjá SAS-flogskiparunum sigur, at eftir hansara meting fer nýggja skipanin at krevja, at tríggir flogskiparar skulu vera við hvørjum flogfari. Ein teirra kann so leggja seg á frívaktini.